# okki



Svartsot

Mynd: Bárður Eklund

## FAKTA

Bárður Eklund hevur fingið fleiri altjóða- og talentvirðislønir

Í 2002 fekk hann Journalisthøjskolens Fotojournalist Jublæumsdelpris

Í 2004 var hann kosin Ársins Portrettfotografur í Danmark

Bárdur Eklund er útbúgvin Fotojournalist frá Danmarks Medie & Journalisthøjskole og Columbia School of Journalism í USA, og er eisini útbúgvin sum Art Photographer.



Eivør Pálsdóttir

Mynd. Bárður Eklund



Sanne Salemonssen

Mynd: Bárður Eklund

dokumentarfoto á sera høgum støði, og tað gleði eg meg veruliga til. Ikki tí, eg havi sjálvur roynt at ment meg innan økið, men tað kann jú ikki samanberast við at fáa frálæru frá nøkrum av heimsins bestu fotografum, sigur Bárður Eklund, og vísir á, at serundirvísing er ein týðandi liður í endamálinum við Nordic Master Class.

### Ikki virðismett á føroysku bløðunum

Bárður Eklund hevur seinnu árini búð í Danmark, men átekur sær javnan fotouppgávur í Føroyum. Hóast tað ikki finnast serliga nógvir útbúnir fotojournalistar her heima, heldur Bárður Eklund, at nógv av teimum, ið fáast við professionella myndatøku í Føroyum, eru stak dugnalig.

- Tað er bara spell, at føroysku bløðini ikki virðismeta dugnaligu myndafólkini meir. Av onkrari orsøk tykjast góðar og illustrativar myndir ikki at vera serliga høgt í metum á føroysku bløðunum. Úrslitið er, at tey dugnaligu myndafólkini leita aðrastaðni til eitt nú lýsingarfyritøkur, har tey fáa munandi betri sømdir, sigur Bárður Eklund.

Hóast hann skilur, hví føroysk myndafólk ikki støðast á bløðunum, heldur Bárður Eklund, at tað kundi verið eitt fínt hugskot at brúkt tey sum ráðgevar og vegleiðarar á redaktiónunum.

- Fyrsta treytin fyri at tú kanst virðismeta myndatilfar í bløðunum er, at leiðsla og starvsfólk fáa innlit í, hvussu myndir og tekstur spæla saman. Her ivist eg ikki í, at myndafólk fegin vildu givið redaktiónum íblástur og vegleiðing, sigur Bárður Eklund.